# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dirvi og ábyrgd

Tað letur til, at hægstu myndugleikar í heilsumálum nú hava kúvent í spurninginum um játtanina til sjúkrahúsverkið, serstakliga Landssjúkrahúsið. Tað, sum almenningurin áður hevur frætt, er, at Landssjúkrahúsið eftir tilmæli frá leiðsluni skuldi skerjast við fimtan milliónum krónum undir teirri fortreyt, at Løgtingið eftirfylgjandi játtaði aðrar fimtan millionir. Fylgjurnar av hesi ætlan vóru ógvusligar, atfinningarnar hava ikki trotið og eitt nú í hesum teigi hava vit víst á, at stovnur og sjúklingar ikki fóru at tola eina so harðrenda framferð. Men nú hevur landsstýrismaðurin eftir at hava viðgjørt skerjingarætlanina hjá sjúkrahúsleiðsluni bart út sagt sópað hesa ætlan av borðinum. Hann hevur í gjár søkt um eykajáttan til tey trý sjúkrahúsini og talan verður ikki um at fremja skerjingar í lívsneyðugum heilivági ella at niðurleggja ætlað virksemi. Til Landssjúkrahúsið verður søkt um 28 milliónir, ið er so nær við upprunaligu tørvinum, sum hugsast kann.

Hans Pauli Strøm hevur við hesum sýnt bæði politiskt dirvi og ábyrgdarkenslu. Nú verður spennandi, hvussu hansara politisku starvsfelagar fara at stilla seg til avgerðina. Vit hava áður ført fram, at Landssjúkrahúsið ongan góðan eigur og at sjúkrahúspolitikkurin í mong ár hevur verið eyðkendur av politiskum illvilja mótvegis Landssjúkrahúsinum. Nú hava samgongupolitikkarar høvi at mótprógva okkara pástand. Vit hava víst á, hvussu inkonsekvent tað er at byggja og innrætta eitt sera nútímans landssjúkrahús og ikki samstundis til fulnar troyta teir viðgerðarmøguleikar, ið hetta gevur. Nú hava samgongupolitikkarar høvi at prógva, at vit hava gjørt teimum órætt, og teir hava høvið at tryggja Landssjúkrahúsinum arbeiðsfrið og harvið tryggja føroyskum sjúklingum ta bestu viðgerð, sum kann fáast her á landi. Vit hava eisini mælt Hans Paula til at seta sess og samgongu uppá spæl, um ikki hann fekk eina eykajáttan, sum tryggjar raksturin á Landssjúkrahúsinum framyvir. Hesi ráð fara vit fyribils at lata standa við.

Eftir standa ósvaraðir spurningar, eitt nú raksturin av Landssjúkrahúsinum í longdini. Her má finnast ein politisk semja, sum kann fyribyrgja hesum støðugt afturvendandi fíggjarkreppunum á LS og sum kann beina burtur tann ótryggleika, sum stendst av hesum. Annar spurningur snýr seg um leiðsluna. Landsstýrismaðurin hevur gjørt av, at ein stýrandi leiðsla yvir øllum trimum sjúkrahúsunum skal tryggja eitt tættari og meira rationelt virksemi. Tað er ilt at siga hvat hetta merkir, men landsstýrismaðurin skyldar tí almenninginum eina nærri frágreiðing um hetta.

**Sosialurin**

## SAMTAK frálíkt samtak

**FINNUR HELMSDAL**
løgtingsmaður



Vit eru nógv, sum seinastu árini hava biðið eftir at viðkomandi myndugleikar gera nakað munagott við tað at greina almennu viðurskifti okkara. Ikki minst tá tað snýr seg um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum, og hvussu hesi ávirka tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum sosialt, heilsuliga og í aðrar mátar, kanska ikki minst við atliti at javnstøðu. Biðið hevur verið eftir at fáa til vega hagtøl, analýsur, prognosur, metingar og ikki minst granskingarúrslit í mun til hesi viðurskifti. Men hevur tað lítið hjálpt at biðja og júka. Landsins myndugleikar hava lítið og einki gjørt við hetta álvarsmál. Ikki tí, seinastu 10 árini hevur nógv verið tosað, men tíverri hava úrslitini als ikki staðið mát við floymin av orðum.

Tó tykist ein glotti at vera fyri stavn. Og er tað felgasátakið SAMTAK hjá føroyskum verkafeløgum, sum er beinleiðis orsøkin til, at ein hómar glottar. Høvuðsuppgávan hjá SAMTAK er at varpa ljós á støðuna hjá teimum, sum verkafeløgini vara av. Varpa ljós á starvsligu-, sosialu-, heilsuligu- og almennu støðu teirra sum heild. Við øðrum orðum er SAMTAK ætlað sum eitt slag av ringari samvitsku hjá arbeiðsgevarum og almennum myndugleikum. Men samstundis eisini sum eitt upplýsandi og mennandi forum, sum skal skapa trivnað og annars betra um støðuna á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Higartil hevur samtakið verið virkið og fingið eina sterka støðu. Fólk hava tikið væl ímóti og nú eisini tikið samtakið til sín. Lítið er at ivast í, at eisini arbeiðsgevarar og almennu myndugleikarnir eru noyddir bæði at góðtaka og virða samtakið og støðu tess í samfelagnum.

SAMTAK hevur ikki bert styrkt støðuna hjá verkafeløgunum munandi. SAMTAK er í mínum huga uttan iva nógv besta og største sosialpolitiska átak í nýggjari føroyskari sosialpolitiskari søgu.

Ein kann so spyrja, um SAMTAK hevði verið líka væl eydnað, um onkur annar enn Sonja í Jógvansstovu sat í leiðarasessinum. Ein torførur spurningur at svara, men lítið er at ivast í, at tað er Sonja, sum hevur myndað samtakið higartil. Við sínum hugburði, skili og róliga treiskni hevur Sonja í Jógvansstovu sett viðurskiftini á føroyska arbeiðsmarknaðinum í perspektiv soleiðis, at vanligi føroyingurin nú dugur nógv betur at skilja og at skyna ímillum tað seriøsa og grundaða og so plattan retorikk. Takk skal Sonja hava fyri tað.

**Byggið víðari**
Mín áheitan á partarnar á arbeiðsmarknaðinum og somuleiðis á landsins myndugleikar er tí: Takið tað, sum SAMTAK leggur fyri dagin til tykkara, byggið víðari á tað og miðið eftir at tryggja ein føroyskan arbeiðsmarknað, sum byggir á javnstøðu, rættvísi og virðing partanna millum. Ein arbeiðsmarknað, hvørs bulur er álítandi hagtøl, kvalifiseraðar metingar og prognosur og ikki minst at alt byggir á dygga og miðvísa gransking.

Nú má stundin vera komin, har vit halda upp at vit at støðga og forða náttúrligari gongd. Og at vit ístaðin leggja doyðin á at lata menningina ganga sína gongd soleiðis, at vit koma longur fram á leið. Verkafeløgini hava við at stovnseta SAMTAK funnið sína gongdu leið.

## Sjúkrahúsverkið

**HERI MOHR**



Tað nógva, sum í longri tíð hevur verið sagt og skrivað um vánaligar fíggjarumstøður hjá okkara sjúkrahúsum – kanska eina mest Landssjúkrahúsið er komið í fokus – órógvar okkum øll, bæði ung og gomul.

Tað er komið so vítt, at Landssjúkrahúsið sum eitt annað trotabúgv skal endurvendast av serkønum fólki, tí landskassin megnar ikki at rinda tað, sum hægstu leiðslir á sjúkrahúsunum hava biðið um í inniverandi fíggjarári.

Alt Føroya fólk hevur fingið at vita, at sjúkrahúsini mugu spara milliónа upphædddir til medisin, sjúkrahúsvirksemi mugu kanska niðurleggjast, og bíðiraðin og -tíðin hjá fólki, ið tørvar sjúkrahúsviðgerð, verður long og drúgv.. Hetta er ikki hugnaligt.

Í Dimmælatting 8. í h. mð. sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, at "eg skilji ikki trupulleikan í veruleikanum." Skulu vit vanlig fólk skilja hetta sum eina sjálvsásanning frá landsstýrismanninum, so kann støðan gerast uppaftur hættisligari.

Um vit nú gera eina sjey ára fíggjarmeting við støði í landskassans ársroknskapum, síggja vit:

- Í 2001 vóru l**andskassans rakstrarútreiðslur** (§§ 1-10) 2,846 mia.
  og í 2007 (§§1-15) 3,767 mia., ella ein øking upp á uml. **33%.**
- Í 2001 vóru **rakstrarútreiðslurnar** hjá **sjúkrahúsunum** (3) 328 mió.
  og í 2007 440 mió., ella en øking upp á uml. **33,5%.**
- Í 2001 keypti **landskassin** vørur v.m. (konto 14) fyri 694,4 mió.
  og í 2007 970,4 mió., ella ein øking upp á uml. **40%.**
- Í 2001 keyptu **sjúkrahúsini** (3) heilivág v.m. (konto 14) fyri 78 mió.
  og í 2007 123 mió., ella ein øking upp á uml. **57%.**

Hendan sjey ára rytman gevur næstan reint ug til umsitingina á sjúkrahúsunum.

Men, men: Sum kunnugt drenaði landsstýrið fíggingina til heilsuverkið, tá tað (landsstýrið) 1. januar 2002 niðurfrysti ríkiskassans lógbundna part (50% og 100%) av útreiðslunum til heilsuverkið. Síðani tá hava áhaldandi trupulleikar verið við fígging av nevnda málsøki. Hetta – skerd fígging – er tann veruligi trupulleikin. Har finna vit óivað "ondets rod."

Tað er illa hugsandi, at yvirlæknar og aðrir sjúkraróktarar á okkara sjúkrahúsum fara at kunna seg um aldar gomul heimaráð í bókini hjá Eiðislæknanum, tí sjúkrahúsverkið hevur ikki ráð til framkomnan heilivág.. Fyrr stinga teir klæðini í posan.

Vónandi fer kanningarnevndin at "skilja trupulleikan í veruleikanum" einaferð í heyst.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støða:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.